# HM í Argentina

**Átta superstórmeistarar telva í hesum døgum um heimsmeistaraskapin. Fýra av teimum fjúrtan umførunum sum leikast skulu eru telvd. Fremstur er Veselin Topalov**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*


*Bulgarski Topolov er í løtuni á odda í stóru kapppingini í Argentina. Her sæst hann í dysti móti Anand, sum er á triða plássinum*

Hendan serliga HM-kapping verður telvað í San Luis, Argentina. Uppruna-liga skuldi FIDE-heimsmeistarin Rustam Kasimdzhanov og Garry Kasparov telva HM-dyst fyrr í ár, og síðani skuldu vinnarin hitta Vladimir Kramnik, men einki spurdist burturúr hesi ætlan.

Ein ætlan við HM-kappingini í San Luis er møguliga tann, at vinnarin av hesari kapping skal telva ein absoluttan HM-dyst móti Kramnik, sum jú er heimsmeistari í beinu linjuni frá tá Wilhelm Steinitz varð fyrsti heimsmeistari. Men nógvir leysir endar skulu fyrst bindast áðrenn hetta verður veruleiki. Ivasamt er um Kramnik er áhugaður í einum slíkum HM-dysti.

### Drúgv kapping

Telvað verður tvær ferðir móti hvørjum øðrum, tað vil siga heili fjúrtan umfør. Fyri nøkrum áratíggjum síðani var hetta ikki óvanligt, men í dag eru fáar kappingar, ið fevna um fleiri enn 11-12 umfør. Kann bert koma í tankar um Wijk aan Zee, EM, HM-dystir og summar liðkappingar.

Atljóða talvsamgongan, FIDE, valdi í byrjanini av árinum út teir telvarar, sum skuldu vera við í Argentina. Spell fyri eitt nú Vassily Ivanchuk, sum í dag er nr. 5 á ratinglistanum. Tá úttøkan varð framd var hann ikki so ovarliga og varð tí ikki boðin við.

Við frídøgum og møguligum umdystum, endar kappingin ikki fyrrenn 15. oktober.

### Eldur á borðunum

Teir átta telvararnir, sum í hesum døgum telva um heimsmeistaraskapin, smæðast í øllum førum ikki burtur í fyrstu fýra umførunum sum í skrivandi løtu eru leikt. Telvað verður til seinasta mann í at kalla hvørjum talvi. Tað er tí ein fragd fyri okkum deyðiligu at fylgja við. Sjálvt javnleikirnir hava verið undirhaldandi og eisini hava flestu teirra verið drúgvir.

### Topalov í serklassa

Veselin Topalov hevur verið flúgvandi í ár og stimin tykist at halda fram í San Luis. Hann hevur 3,5 stig og í javnleikinum ímóti Anand hevði hann møguleikar at vinna. Topalov er, saman við Viswanathan Anand, verdugir arvtakarar eftir pensioneraða Kasparov.

Anand fylgdi fyrstu trý umførini við Topalov, men óvæntaði ósigurin ímóti tí væltelvandi Kasimzdhanov kom illa við. Hetta gav eisini sterka russinum Peter Svidler møguleikan at blanda seg av álvara í oddastríðið. Svidler hevur trý stig eftir sigrar á Peter Leko og Alexander Morozevich. Anand er tó væl við og heili tíggju umfør eru jú eftir at leika.

Leko fekk ringa kappingarbyrjan, men reisti seg í fjórða umfar, tá hann vann eftir einans 25 leikum á Judit Polgar. Leko hevur, eins og Polgar, 1,5 stig.

Michael Adams og Morozevich eru aftastir við bert einum stigi.

Mánakvøldið 03. oktobur verður oddabrak, tá Svidler hevur hvíta fólkið móti Topalov. Eisini verður spennandi at fylgja talvinum millum Anand og Leko.

**Støðan eftir 4. umfar**

| Navn | Land | Rat. | Stig |
|---|---|---|---|
| 1 Topalov | Bulg | 2788 | 3,5 |
| 2 Svidler | Russ | 2738 | 3,0 |
| 3 Anand | India | 2788 | 2,5 |
| 4 Kasimzdhanov | Usbk | 2670 | 2,0 |
| 5 Polgar | Ung | 2735 | 1,5 |
| 6 Leko | Ung | 2763 | 1,5 |
| 7 Adams | UK | 2719 | 1,0 |
| 8 Morozevich | Russ | 2707 | 1,0 |

## Talvið hesa vikuna

**Anand,V (2788) - Adams,M (2719)**
WCh-FIDE San Luis (3), 30.09.2005

**1.e4 e5 2.Rif3 Ric6 3.Bb5 a6 4.Ba4 Rif6 5.0-0 Be7 6.Re1 b5 7.Bb3 d6 8.c3 0-0 9.h3 Bb7 10.d4 Re8 11.Ribd2 Bf8** (Kend støða í sponsku byrjanini) **12.a4 h6 13.Bc2 exd4 14.cxd4 Rib4 15.Bb1 c5 16.d5 Rid7 17.Ra3!** (Rókurin ætlar sær til verka ímóti konginum) **17...c4 18.axb5 axb5 19.Rid4 Fb6 20.Rif5 Rie5 21.Rg3 g6 22.Rif3 Ried3**




**Støðumynd eftir 22...Ried3**

**23.Fd2!** (Anand segði eftir talvið, at hann hevur goymt hesa idé í sjey ár!) **23...Bxd5** (Adams vildi ikki taka rókin beinanveg. Helst var hann bangin fyri góðu hvítu álopsstøðuni, sum Anand fær afturfyri rókin) **24.Rixh6+ Bxh6 25.Fxh6 Fxf2+ 26.Kh2 Rixe1 27.Rih4!** (Anand kundi fáa ævigt skák við Rxg6, men valdi heldur at vita um hann kundi fáa alt stigið. Og hvat skal svartur gera? Møguliga er Ra7 besta loysn) **27...Ried3? 28.Rixg6! Fxg3+ 29.Kxg3 fxg6 30.Fxg6+ Kf8 31.Ff6+ Kg8**




**Støðumynd eftir 31...Kg8**

**32.Bh6** Adams gavst. 32...Ra7 tapur eftir 33.Fg6+ og síðani 34.Fxe8+ **1-0**

# »Bíligt« meistaraheiti

**Áskoðararnir fegnast sjálvandi um spenningin, sum hevur verið í Formula-deildini í ár. Men spurningurin er, um hesin er íkomin, tí oddaliðini eru javnt sterk ella javnt veik**

HAGTØL
*Jákup Mørk*

Ikki síðanin 1991 hevur úrtøkan hjá einum oddaliði verið so lítil fyri hvønn dystin, sum hon hevur verið tað í ár. At kalla síðani fyrsta umfarið hevur talan verið um eitt sera tætt oddastríð, har tað fyrst og fremst hava verið B36, HB og Skála, sum hava sett dám á.

Títt og støðugt hevur oddasessurin skift eigara, og tó B36 helt sær ovast eftir hetta vikuskiftið, so var aftur hesa ferð talan um óvæntað úrslit, har øll oddaliðini vóru fyri stigamissi.

Tað hava tey eisini verið rættiliga ofta í ár. Somikið ofta, at verður roknað í mun til spældar dystir, so skulu vit leita heilt aftur til 1991, áðrenn vit finna eitt meistaralið, sum hevur eina lægri úrtøku pr. dyst, enn verandi oddaliðið úr B36 hevur tað. Eisini ta ferðina var talan um sera javnt oddastríð, har tað serliga vóru B36 og KÍ, sum stríddust. Tey bæði vóru eisini jøvn í stigum eftir seinasta leikdag, og varð málúrtøkan soleiðis avgerandi ta ferðina. Og í stigum var bara eitt niður til GÍ og VB, tó at hvørki teirra hevði møguleikan til gullið á seinasta leikdegnum.

Til stuttleikar hava vit niðanfyri sett upp talvu, sum sýnir úrtøkuna pr. dyst hjá fremstu feløgunum síðani 1991. Og sjálvandi kunnu bæði felag og stigatal broytast fyri 2005!

| Ár | Felag | Stig | Dystir | Stig/dystir |
|---|---|---|---|---|
| 1991 | KÍ | 34 | 18 | 1,89 |
| 1992 | B68 | 38 | 18 | 2,11 |
| 1993 | GÍ | 39 | 18 | 2,17 |
| 1994 | GÍ | 44 | 18 | 2,44 |
| 1995 | GÍ | 41 | 18 | 2,28 |
| 1996 | GÍ | 39 | 18 | 2,17 |
| 1997 | B36 | 48 | 18 | 2,67 |
| 1998 | HB | 45 | 18 | 2,50 |
| 1999 | KÍ | 41 | 18 | 2,28 |
| 2000 | VB | 40 | 18 | 2,22 |
| 2001 | B36 | 46 | 18 | 2,56 |
| 2002 | HB | 41 | 18 | 2,28 |
| 2003 | HB | 41 | 18 | 2,28 |
| 2004 | HB | 41 | 18 | 2,28 |
| 2005 | B36 | 48 | 25 | 1,92 |

GG: Til 1995 vórðu tvey stig latin fyri vunnan dyst. Tølini fyri hetta eru umroknað til 3-stiga skipanina